




# Týr gjørt útgávusáttmála eystanfyri



*Russiska forlagið, CD-Maximum, hevur fingið rættindi til at geva út fløguna How far to Asgaard úr í Ruslandi, Estlandi, letlandi og Litava*

**Týr hevur gjørt avtalu við russiska forlagið CD-Maximum, sum hevur tryggjað sær rættin at geva fløguna How far to Asgaard út í Russlandi, Estlandi, Letlandi, Litava og øðrum fyrrverandi sovjetiskum lýðveldum**

TÓNLEIKUR
*pop.fo*

Nú hevur Ormurin langi sett kós eystureftir.

Rockbólkurin Týr hevur gjørt avtalu við CD-Maximum, sum er av russiskum uppruna, og felagið fær lisensrættin yvir útgávuni How far to Asgaard í fleiri londum.

CD-Maximum kann geva fløguna hjá Týr út í Russlandi, Ukraina, Hvítarusslandi, Kazakhstan, Kyrgistan, Moldova, Georgia, Armenia, Aserbajdjan, Usbekistan, Tadjikistan, Turkmenistan, Estlandi, Letlandi og Litava.

Avtalan umfatar útgávu, promotoion og útbreiðslu av fløguni.

Tað er felagið IntroMental Management, sum hevur syrgt fyri avtaluni millum Týr og russiska forlagið.

Tónleikurin hjá Týr er komin víða, og hann verður spældur á nógvum útvarpsstøðum kring Europa og USA, og fleiri ummæli hava eisini verið í serligum rocktíðarritum og á heimsíðum.




